Munnlig próvtøka

Leiðbeining til lærarar

Fakligt øki	Kjarnaøki, tema, tekstslag ella annað viðkomandi sambært undirvísingarfrágreiðingum.
Ólisið tilfar	Høvundur, heiti, árstal og annað viðkomandi.
Próvtøku-spurningur	Í próvtøkuspurninginum skal greitt koma fram, at próvtakarin skal viðgera ólisna tilfarið við viðkomandi háttalagi og sjálvstøðugt seta tað í frásjón og í samband við lisið tilfar úr undirvísingarfrágreiðingunum. Leiðbeinandi spurningar, sum t.d. biðja próvtakaran leggja dent á nakað ávíst í viðgerðini ella í frásjónargerðini, kunnu vera. Somuleiðis ber til at vísa á ávíst lisið tilfar at seta í samband við. Havast má tá í huga, at leiðbeinandi spurningar ávirka torleikastigið á próvtøkuspurninginum og harvið eisini heildarmetingina av avrikinum hjá próvtakaranum.

Úr námsætlanini

Próvhoyringin varir umleið 30 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er umleið 60 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.

Undir próvhoyringini leggur próvtakarin fyri við framløgu við støði í próvtøkuspurninginum, sum próvtakarin hevur arbeitt við í fyrireikingartíðini. Restin av próvhoyringini er ein faklig samrøða millum próvtakara og próvhoyrara við støði í próvtøkuspurninginum og framløgu próvtakarans.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.